# SEMJA

Millum Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Fíggjarmálaráðið er henda semja gjørd um Strandfaraskip Landsins.

Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober 2010 til 1. oktober 2011, og byggir á ein karm, sum er 1%.

1. Tann 1. oktober 2010 hækkar lønin 1%.
2. Inn kemur nýggj grein:
   "Reiðarin rindar kravdar læknakanningar".
3. Másin verður strikaður í § 3.
4. Nýggjar staðbundnar avtalur verða gjørdar, har lønarbrøkirnir í minsta lagi eru hesir:

| | Brøkur | Svarandi til í tímum |
|---|---:|---:|
| Smyril | 1,000 | 212,3 |
| Teistin | 0,890 | 188,9 |
| Ternan | 0,945 | 200,6 |
| Sam | 0,950 | 201,7 |
| Ritan | 0,939 | 199,3 |
| Sildberin | 0,857 | 181,9 |

   Hesir lønarbrøkirnir verða galdandi frá 1. juni 2011, tó soleiðis at ongin kann verða reguleraður niður í hýru.

5. Í § 13, stk. 1 verður soljóðandi:
   "Arbeiðsætlan verður gjørd fyri hvørt skipið sær, eftir galdandi ferðaætlan, har hædd verður tikið fyri neyðuga tíð til til- og frátørning, sum í bólki II er um hálvan tíma."
6. Sáttmálin og lønartalvan verða dagførd samsvarandi omanfyri standandi.
7. Partarnir eru samdir um, at við komandi sáttmálasamráðingar, skulu altjóða ásetingarnar um setanarviðurskifti fyri sjófólk, sum ásett eru í MLC 2006-sáttmálanum, takast upp.
8. Sáttmálin er galdandi fyri tíðina frá 1. oktober 2010 til 1. oktober 2011.

Tórshavn tann 23. mai 2011

**Fíggjarmálaráðið**

Aksel V. Johannesen

Snorri Fjallsbak

**Føroya Skipara- og Navigatørfelag**

Eyðstein Djurhuus

Regin Nónstein

Ellintur Abrahamsen

Leivur Christiansen